

*Haraldur talaði til tjóðina – og tjóðin lurtaði*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Hinir brúnu kinnar eru bergini, tað gula hár er grasið, og tey djúpu, reinu og kláru eygu eru Føroya vøtn, gil og firðir.

Soleiðis er faðirs smátta. Vøkur og mild.

Tá eg var mær í haganum henda dagin kundi eg ikki annað enn taka um ein stein, sum hevur verið her so nógv 1.000 ár fleira enn eg. Eg kysti steinin, og ... hann kysti meg aftur. Tað var týðuligt, at hann kendi meg so nógv betur, enn eg kendi hann. Kendi mín trega, mín longsul og pínu. Síðani tveittu vit okkum, eg og steinurin, í eitt gil har vit bóltaðust í runu og vatni til vit tváðaðu okkum í hinum mjúka grasi.

Tá vit síðani turrir lógu og hugdu uppi í himmalhválvið, tá kendi eg meg eitt við Føroyar – og eg stórgræt. Græt um Føroyar og fyri Føroyar.

Men tað er mær altíð ein troyst at tann sveitti, ið sprikir úr mær og tey tár eg grátI í kampinum fyri Føroyar, tað er sami sveitti og somu tár, sum runnu av fornum abbum, tá lunnar vóru lagdir undir Føroyar. Sami sveitti og somu tár, ið fara at renna av teimum, ið eftir okkum koma. Hesi tár og sveitti renna niður í sama kar, og úr hesum kari kunnu øll, sum vilja hoyra til tjóðina, súgva sær tjóðskaparligan stirðil.

Ein teirra ið lat nógvar dropar í karið, var maðurin, ið stendur her á torginum, stoyptur í bronsu. Nólsoyar Páll. Hansara andi er livandi og til staðar. Og vitanin um, at hansara og míni tár nú renna saman fær meg at ... ja, stórgráta.

Tað gevur ikki eyð og ognir at stríðast fyri Føroyum. Men tað gevur heiður. Og tað gevur vissuna um hitt æviga lívið.

Tí tann, sum berjist fyri tjóðina, gerst eitt við teir, ið bardust sama kamp fyri øldum síðani og eitt ið teir, sum í komandi øldum fara at stríðast hitt góða stríð.

Tjóðin er ein vera, sum livir gjøgnum ættarliðini. Offrar tú títt lív til hana, livir tú víðari í hennara sterka hjarta, eftir at títt lítla hjarta er tagnað. Nólsoyar Páll og Gøtutróndur liva enn, og eins og teir kunnu vit liva í ókomnum øldum.

Tann einstaki livir og doyr; tjóðin bara livir!

Tann einstaki er einki; tjóðin er alt!

FØROYAR Í ÆVIR!